Drogba bestur í Afrika

Drogba hevur í heyst sagt, at hann ætlar at gerast besti málskjútti í Premier League í Onglandi í ár, men longu nú hevur hann vunnið ein annan heiður.Chelsea framherjin vann nevniliga atkvøðugreiðsluna, tá besti afrikanski spælarin skuldi finnast í gjár. Nummar tvey gjørdist Barcelona áleyparin, Samuel Eto'o, meðan liðfelagin hjá Drogba, Michael Essien, endaði á triðja plássi. Eto'o hevur annars vunnið heiðurin seinastu trý árini, men nú hevur Drogba also sent hann niður á annað plássið.

Suðuroyarkapping í fótbólti

Komandi vikuskifti fara VB/Sumba, TB, B71 og Skála at kappast í nýggjari kapping. Hóast tað er ein mánaður eftir, áðrenn fótbóltslandskappingin byrjar, liggur fótbólturin ikki heilt stillur. Leygardagin skipar VB/Sumba á fyrsta sinni fyri nýggjari Suðuroyarkapping, har TB, B71 og Skála koma til Vágs at kappast. Lutakast hevur verið um dystirnar, og spæla B71 og Skála klokkan 14, meðan TB og VB/Sumba spæla klokkan 16. Sunnudagin verður dystur um triðja plássið klokkan 12.30, og klokkan 14.30 verður so finaludysturin á skránni.

KÍF tapti einki sett

KÍF vann 1. deild hjá kvinnum í flogbólti í gjárkvøldið, tá tær vunnu 3-0 ímóti Fleyr í Gundadalshøllini. Kvinnuliðið hjá KÍF megnaði enntá at vinna allar sínar dystir uttan at tapa eitt einasta sett

FLOGBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Kvinnuliðið í 1. deild hjá KÍF í flogbólti hevur vunnið allar sínar dystir í hesum kappingarárinum uttan at hava tapt eitt einasta sett

Lagt var upp til ein spennandi dyst í Gundadalshøllini í gjárkvøldið, tá Fleyr tók ímóti KÍF í 1. deild hjá kvinnum í flogbólti. Undan dystinum lá KÍF á odda í deildini, meðan Fleyr lá á øðrum plássi bert tvey stig aftanfyri.

Tað var tó longu greitt undan dystinum, at KÍF hevði vunnið 1. deild, tí áðrenn dystin ímóti Fleyr høvdu tær vunnið allar sínar dystir 3-0, so sjálvt um Fleyr skuldi vunnið henda dystin 3-0, so høvdu tær allíkavæl enda aftanfyri KÍF.

KÍF vann alt

Best kvinnuliðið hjá Fleyr hevur ligið í næstbestu deildini í nøkur ár. Tær hava stríðst við at koma uppaftur í bestu deildina, men í fleiri umførum hava tær verið júst ov stuttar. Í ár hava tær tó fingið sera harða mótstøðu frá næstbesta liðnum hjá KÍF, og tá liðini møttust í Gundadalshøllini í gjárkvøldið, lat KÍF ongan iva vera um, hvat var tað betra av liðunum. KÍF vann nevniliga enn einaferð 3-0, og sostatt megnaðu tær at spæla eitt heilt kappingarár uttan at tapa eitt einasta sett í næstbestu kvinnudeildini. Hetta hevur fært við sær, at KÍF eftir 10 dystir hevur 20 stig, og settmunurin er 30-0.

Tað vil siga, at KÍF er vinnari at 1. deild hjá kvinnum, meðan Fleyr endar á øðrum plássi, men av tí at KÍF hevur eitt lið í meistaradeildini, so er líkt til, at Fleyr skal spæla ein upp- og niðurflytingardyst ímóti besta kvinnuliðnum hjá Mjølni, sum endar á aftasta plássi í meistaradeildini hjá kvinnum.

Toppskjúttar í hondbólti

Atlantic Airways kappingin:

Finnur Hansson	StÍF	135
Damir Oros	KÍF	130
Blagoje Buha	Neistin	112
Rókur Akralíð	Kyndil	108
Sámal Joensen	VÍF	103
Esbern Patursson	H71	102
Daniel Rapa	KÍF	95
Hans Áki Dal Christiansen	Kyndil	86
Tróndur Kragesten	Neistin	84
Agnar Joensen	VÍF	80

Sunset kappingin:

Nicoleta Radu Hansen	Neistin	140
Daiva Tuomaite	VB	118
Ninna K. Johansen	StÍF	95
Lina Andriulyte	Kyndil	92
Rebekka Justinussen	StÍF	89
Simona Petersen	Stjørnan	75
Alina Olaru	Stjørnan	73
Ivana Ljubicic	VB	56
Ása Dam á Neystabø	Neistin	55
Anja Heinadóttir	Kyndil	53

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Stjørnan	7	7	-	0	-	0	383	295	88	20
2 Neistin	7	5	-	0	-	2	395	336	59	17
3 VB	8	3	-	1	-	4	395	395	0	11
4 StÍF	7	1	-	2	-	4	326	408	-82	6
5 Kyndil	7	0	-	1	-	6	340	405	-65	3

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN

Atlantic Airways-kappingin

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 VÍF	7	3	-	1	-	3	518	475	43	16
2 Kyndil	7	5	-	1	-	1	500	470	30	15
3 StÍF	7	3	-	0	-	4	458	453	5	13
4 KÍF	7	4	-	2	-	1	451	467	-16	13
5 Neistin	7	2	-	1	-	4	509	496	13	11
6 H71	7	1	-	1	-	5	459	534	-75	6

Flogbóltsstøður
Meistaradeild kvinnur

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/-	stig
1 ÍF	18	13	-	5	45	31	14	19
2 SÍ	17	11	-	6	39	28	11	16
3 Dráttur	18	11	-	7	42	34	8	15
4 KÍF	18	7	-	11	35	38	-3	12
5 TB	17	8	-	9	32	29	3	10
6 Mjølnir	18	3	-	15	16	49	-33	2

Ósigraðir í trý ár

Triðbesta mansliðið hjá VÍF hevur vunnið 2. deild í ár, og teir hava ikki tapt ein dyst í hesi deildini í samfull trý ár

HONDBÓLTUR
Teitur Joensen
teitur@sosialurin.fo

Gyltu vestmenningarnir eru standandi Rógvi Nielsen, Ólavur Brimnes, Einar Brimnes, Finn Jørgin Olsen, Oyvnindur Brimnes og Hjalmar Klein Olsen. Húkandi eru Marner Seloy, Jógvan Emil Nielsen, Kristen Friis, Høgni Johansen, Petur Frank Joensen og Johnny Joensen

Veteranarnir hjá VÍF eru uttan iva millum mest sigursvandu lið í føroyskum ítrótti. Flestu teirra hava verið við til at vinna hópatals FM-heiti í manshondbólti, og tó at ferðin í dag er meira rólig, so er vinnaraviljin enn tann sami. Soleiðis vann liðið aftur í ár kappingina í trið bestu mansdeildini, og triðja árið í slag fór liðið ósigrað gjøgnum kappingina. Tí er einki at siga til, at sigursrómurin var stórur, tá teir fyri tveimum vikum síðani kundu staðfesta støðuna sum sterkastu veteranarnir í landinum við sigri á Team Klaksvík, sum tó fekk eitt blómutyssi við sær á leiðini upp í fyrstu deild.